## Flogvanlukka í USA

Minst 17 fólk doyðu, tá eitt lítið flogfar datt niður í amerikanska statinum Montana seint í gjárkvøldið. Flogfarið gjørdi seg til at seta seg á flogvøllin í býnum Butte, tá tað brádliga datt niður í ein kirkjugarð einar 150 metrar frá lendingarbreytini. Talsmenn hjá løgregluni í Montana søgdu fyrrapartin, at fleiri børn vóru millum ferðafólkini. Flogfarið, sum var av sveisiska slagnum Pilatus PC-12, kom úr Kalifornia. Tað skuldi upprunaliga til býin Bozman, men flogskiparin gjørdi av at lenda í Butte. Eitt felag í statinum Oregon átti flogfarið.



## Umval í Makedonia

Forsetavalið í Makedonia um vikuskiftið gav einki úrslit, tí einki valevni fekk meiri enn 50 prosent av atkvøðunum, og tað er neyðugt fyri at vinna. Tann konservativi George Ivanov, sum undan valinum varð mettur at hava teir bestu møguleikarnar, fekk 38 prosent av atkvøðunum. Hann skal tí royna eina ferð afturat á umvalinum, sum verður tann 5. apríl, men í morgun var ikki greitt, hvørjum hann skal kappast ímóti tá. ES hevði sent eygleiðarar til Makedonia at halda eyga við valinum, og teir siga, at alt gekk, sum tað skuldi, og harafturat var valdagurin friðarligur.

# llafirði



*Vit hava í fleiri mánaðir fylgt málinum um Topaz, sum liggur í Las Palmas. Men tú skalt ikki longri enn til Kollafirðar fyri at finna Ros, har manningin er í líknandi støðu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

lán til teir átta milliónir rublarnar, ið hann manglar fyri at gerast bótaførur, men at bankarnir í Russlandi hava givið honum noktandi svar.

- Vit trúgva ikki, at reiðaríið er farið á heysin, og reiðarin hevur eisini lovað okkum løn, so vit rokna við, at málið fer at loysa seg sjálvt, sigur skiparin. Tó veit Sosialurin eisini, at manningin var sera illgrunasom til mikudagin, tá reiðarin kom umborð og greiddi manningini frá síni støðu. Hann segði seg hava kvotur í Barentshavinum, so alt nokk skuldi fara at ganga.

Hesar útsagnir hava eftir øllum at døma havt við sær, at manningin hevur fingið nýtt mót.

Somuleiðis hevur Oleg Khroni sagt, at hann ger alt hann kann fyri at halda upp á skipini, og um hetta merkir, at hann skal í ST-dómstól ella beinleiðis til russisku stjórnina, so ger hann tað.

Sosialurin hevur tosað við Árna Dam, sum hevur Faroe Agency, um málið fer at hava nakra ávirkan á viðurskiftini hjá Føroyum við Russland.

- Eg skal ikki siga, at tey gerast beinleiðis verri, men hetta ger tey so ikki betri, staðfestir Árni Dam.

### Jørgen gjørt sítt

- Futin ger tað, hann ongantíð hevur gjørt fyrr. Hann letur annað skipið fara við øllum fonginum. Ímóti lyftinum, at tað skuldi gjaldast, og síðani tá er onki hent, greiðir Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, frá. Hann leggur afturat, at hetta er ein vanlukkulig støða, men at ráðið hevur roynt at gera sítt.

- Í novemburmánað royndu vit at loysa málið. Vit fingu saman við føroyskum privatum intiativi syrgt fyri, at menninir umborð allir kundu sleppa heim. Tað vóru so tríggir, sum ikki vildu fara við, og vóru verandi umborð á skipinum hjá reiðaranum, sum ikki vil geva teimum løn, sigur Jørgen Niclasen, sum leggur dent á, at málið liggur hjá donsku rættarskipanini, og tí kann uttanríkisráðið ikki gera nakað.

- Men russar vóru sera positivir, tá vit sjálvi tóku intiativ, so eg rokni ikki við, at hetta kann gera viðurskiftini verri, men tað kann altíð vera, at okkurt verður. Men stóri trupulleikin liggur hjá reiðaranum, sigur Jørgen Niclasen, sum heldur støðuna vera vanlukkuliga. Umframt, at hann ikki heldur, at reiðarin hevur víst nóg stóran áhuga at hjálpa monnunum, samstundis, sum hann sigur, at tað er undarligt, at reiðarin kann koma til Føroyar, um hann ongan pening hevur.

### Óviss lagna

Enn er ikki greitt, hvør lagnan hjá manningini á Ros verður, men reiðarin hevur lovað teimum 2000 dollarar fyri at vera í Føroyum, umframt, at hann hevur lovað monnunum eina feriu við sól og summari í – halt nú fast – Las Palmas á Gran Kanaria, og hetta skal vera í augustmánaði, um reiðarin skal halda orð.



*Í átta mánaðir hava tríggir russar verið gíslar í einum máli, meðan ein russiskur trolari er tikin í pant av føroyska dómsvaldinum. Á myndini eru skipari og maskinmaður, elektrikarin hevði frívakt og lá í koyggjuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Í rættinum í 10 mánaðir

Orsøkin til, at menninir sita sum gíslar í Kollafirði er, at Ros og Izotop, sum eru einastu skipini í reiðarínum hjá Oleg Khroni, í maímánaði vóru tikin fyri at fiska í føroyskum øki.

Um somu tíð varð reiðaríið í Føroya rætti dømt at gjalda 100.000 krónur fyri hvørt skipið í bót fyri at fiska ólógligt.

### Í Landsrættin

Hetta vildi reiðarin ikki ganga við til og skeyt málið inn fyri Landsrættin. Tó kundi hann onga trygd veita, og tí endaði tað við, at Ros var lagt í Kollafirði sum pant fyri peninginum.

Málið hevur síðani javnan verið fyri í Landsrættinum, og ikki fyrr enn hósdagin varð dómur sagdur í málinum. Við øðrum orðum hevur skipið verið í rættarskipanini í átta mánaðir, fyri eitt brot á fiskivinnulógávu, har dómur vanliga verður staðfestur heilt skjótt.

- Hetta er ein alvorliga trist støða, men klárar tú at koma við einum boðið um, hvat vit kundu gjørt øðrvísi, so høvdu vit verið øgiliga takksom, sigur Finn Ougaard, varafúti.

Tað, sum hendi í Landsrættinum, tá málið skuldi avgreiðast í oktobur, var, at reiðarin vísti á, at danir ikki halda havkommisiónina hjá Sameindu Tjóðum, sum millum annað sigur, at øll kort skulu vera latin inn til ST, tí skipini høvdu ikki røtt kort, og hildu tí, at teir vóru í altjóða sjógvi.

### Ikki tað einasta

- Tað, sum er enn verri í hesum málinum, er, at í 2001 var eitt skip, sum eisini var úr Murmansk, sum hevði júst sama trupulleika, og nú eru vit aftur í støðuni, og reiðarin var á onkran hátt ikki veitt trygd, og tí eru vit endaði í hesi støðuni, sigur Finn Ougaard, sum á ongan hátt heldur tað vera stuttligt, at tríggir sjómenn eru endaðir í klemmu á henda hátt.

Hósdagin var dómur sagdur í Landsrættinum, men nú var kravið nógv meira enn 200.000 krónur. Nú var nevniliga dýrur sakarmálskostnaður umframt 385.000 krónur í havnargjaldi og 270.000 fyri veiðina, sum hitt skipið fór avstað við.

ej